Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini:

Ikki rætt at seta ov nógvar treytir í forkanningarloyvini

-Eg ivist í, um áhugin fyri at gera forkanningar, hevði verið eins stórur, høvdu vit sett ov nógvar treytir við. Oljuvinnan er als ikki byrjað. Talan er enn bert um eina fyrireiking. Og her hevur marknaðarføringin av føroyska økinum ómetaliga nógv at siga. Vit royna at marknaðaføra okkum so skilagott sum tilber, eisini hvat seismikkinum viðvíkur

Martin Heinesen, leiðari á Oljufyrisitingini: -Tað vildi verið skeivt at sett seismikkfeløgunum strong krøv. Vit eru ikki í eini oljuvinnu, men bert fyri at fyrireika hana, og tí má ein meta um fyrimunir og vansar, tá talan er um krøv

JAN MULLER

Spurningurin um hvørjar treytir eiga at verða settar útlendskum fyritøkum, sum gera kanningar á føroyskum øki í sambandi oljuleiting, hevur verið nógv frammi í seinastuni. Í samrøðum við Dimmalætting hava umboð fyri vinnuna oo. funnist harðliga at mannagongdini, sum føroysku oljumyndugleikarnar hava brúkt mótvegis seismikkfeløgunum. Málið hevur eisini fyrr verið frammi í Sosialinum og loftmiðlunum

Herfyri segði ein av stjórunum í seismikkfelagnum PGS, at teir fóru at umhugsa møguleikan at gera meira brúk av føroyskum havnum og tænastum

Men nú er so komið fram, at bert fá av teimum mongu seismikkfeløgunum, ið gera kanningar við Føroyar, brúka føroyskar tænastur. Hesar tænastu fáast skjótari og harvið bíligari í Hetlandi

Vit fyrireika okkum

Sosialurin hevur spurt leiðaran á Oljufyrisitingini, Martin Heinesen, um tað ikki var eitt mistak ikki at seta ávís krøv til seismikkfeløgini um at brúka føroyskar tænastur!

-Hetta málið hevur verið frammi áður, og sjálvandi kunnu tað vera nógvar meiningar um, hvat er skilabest at gera. Vit hava so alla tíðina mett, at tað var ikki rætt at seta treytir av hesum slag í forkanningarloyvini

Eitt er hvat er vanligt og ikki í vinnuni, men at seta slík krøv frá fyrsta degi til seismikkfeløgini, sum skulu gera kanningar, er fyri tað fyrsta óhoyrt, og harnæst vildi tað verið ein álvarslig forðan í tí marknaðarføring, sum er í gongd.

Martin Heinesen vísir á, at vit frá føroyskari síðu í løtuni eru inni í einum tíðarskeiði, har marknaðarføringin av føroyska økinum er ómetaliga týdningarmikil

-Hetta er ikki oljuvinnan. Hon er enn ikki byrjað í Føroyum. Talan er um eina fyrireiking til oljuvinnu, har tað verður roynt at marknaðarføra føroyska økið so skilagott tilber, soleiðis at áhugin verður størst møguligur. Sjálvandi er áhugin nógv tengdur at tí, sum feløgini meta og vóna. Men hvussu myndugleikarnir handfara feløgini er eisini týdningarmikið í øllum hesum. At seta, í teirra eygum heilt óhoyrd og órimulig krøv, bara tey skulu hava eitt loyvi her til at gera avmarkaðar kanningar, vildi virkað heilt í andsøgn við endamálið at marknaðarføra føroyska økið.

Nógv stig tikin frá føroyskari síðu

Martin Heinesen vísir annars aftur atfinningunum um, at teir bara fylgja øðrum og gera tað, sum aðrir hava gjørt

-Vit fylgja so avgjørt ikki bara hinum. Tað verður so sanniliga gjørt nógv frá føroyskari síðu, sum aðrir ikki hava gjørt ella gera. Við hesum sipar hann m.a. til tað stóra umhvørvisprojektið, (GEM) sum útlendsk oljufeløg fíggja, og sum er eindømi í oljusøguni

-Eg veit ikki um nakað stað í verðini, har oljufeløgini hava fingið til uppgávu saman og saman við føroyskum myndugleikum at gera eitt so stórt umhvørvisprojekt, sum tað, ið talan er um at gera fyri føroyska økið. Á henda hátt verður kompetansa uppbygd hjá føroyskum stovnum og kanningar gjørdar, áðrenn nakað av feløgunum hevur fingið nakað loyvi og trygd fyri nøkrum. Hetta stig kemur beinleiðis frá Oljufyrisitingini. So tað er ikki rætt at siga, at eingi initiativ verða tikin hagani

Western eindømi

Vit spurdu Martin Heinesen, hvussu tað ber til, at krøv vórðu sett Western, tá hetta seismikkfelagið arbeiddi á føroyskum øki fyri nøkrum árum síðani - at tað tí brúkti føroyskar tænastur!

-Tað var nakað serstakt. Har vóru treytir við, sum ikki eru í standardloyvunum til hini feløgini í dag. Western fekk eitt einaloyvi í tvey ár. Hetta varð gjørt fyri, at vit kundu seta teimum treytir um at gera eina umfatandi kanning av øllum tí føroyska økinum og ikki bert í einum horni, sum var tað mest áhugaverda. Tað er ein partur av tí politikki, sum er ríkin. Av tí at Western fekk fyrimunin at vera einsamalt á føroyskum øki, kundi tú so eisini seta teimum fleiri treytir. Fær eitt felag ikki ávísar fyrimunir, so ber heldur ikki til at seta tí serstakar treytir. Og nettup tað sama ger seg galdandi, tá tað kemur til oljufeløgini. Fyri at tey skulu fáa fyrimunir til leiting osfr. ber eisini til at seta teimum treytir

Martin Heinesen sigur annars, at Oljufyrisitingin avgjørt eggjar seismikkfeløgunum til at brúka føroyskar tænastur, men hetta verður sum nevnt ikki sett fram sum nakað krav.

Landskassin inntøkur frá forkanningum

Hann vísir annars aftur pástandunum um, at eingir pengar eru komnir til føroya samfelagið, síðani kanningarnar byrjaðu. Hann vísir á, at landskassin hevur fingið eina tveysiffraða milliónaupphædd í gjøldum fyri tey ymsu loyvini

Tað hevur onkuntíð verið frammi, at manningarnar á seismikkskipum, útgerðarskipum oo., sum arbeiða á føroyskum øki, áttu at rindað skatt í Føroyum

Hvat sigur Martin Heinesen til henda spurningin!

-Í sambandi við oljuskattalógina verður arbeitt við tí spurninginum bæði í Oljuráðleggingarnevndini og hjá Toll- og Skatt

Leiðarin á Oljufyrisitingini sigur, at ein av høvuðsuppgávunum hjá Oljufyrisitingini er at royna at marknaðarføra tað føroyska økið á ein skilagóðan hátt

-Um tað er eydnast higartil mugu so onnur meta um. Í hvussu er síggja vit, at nógv oljufeløg og seismikkfeløg eru sera virkin á føroyskum øki. Spurningurin, sum tó er ómøguligur at svara, er, hvussu stórur hevði aktiviteturin verið, um vit frá byrjan settu slík strong krøv, sum nú eru frammi í orðaskiftinum. Eg havi mín iva, um virksemið tá hevði verið tað sama, sum tað er í dag. Og tað eru nettup umrøddu forkanningar, sum eru ein týðandi partur av, hvussu stórur áhugin verður fyri at verða við í leitingini við Føroyar.

Martin Heinesen sigur, at vit sjálvandi kundu sett strong krøv frá fyrsta degi, men skuldi tað havt við sær, at feløgini hildu seg burtur, tí tað eru óhoyrd krøv í teirra verð, so hevði ikki verið væl vorðið.

Hann vísir annars á, at tað eru tey fægstu skipini, sum eru á føroyskum øki í fleiri mánaðir.

Leiðarin av Oljufyrisitingini sigur, at vit eiga at hugsa okkum væl um, áðrenn vit seta strong krøv. Hetta má altíð setast í ein samanhang og metast má um bæði fyrimunir og vansar

Higartil í ár eru givin 9 forkanningarloyvi. Tey eru til Digicon, BP, Geoteam, Nopec, PGS, Arco, Shell, Saga og Geco Pracla

Útsølan heldur fram

enn er møguleiki at fáa okkurt sera bíligt

Grýtur nú frá 148,- kr.

Tertuføt nú 17,- til 33,- kr.

Bestikk sett v. 4 av hvørjum nú 48,

Laserknívar & bakiformar nú ÷ 50%

Ísspannir, dekkserviettar, ljósastakar o.a. nógv niðursett

P/f VALDEMAR LÜTZEN

Vágsbotn • Tlf. 11675